*Framhald av síðu 11*

> *"Næstan øll eru samd um, at føroyingar skulu taka ábyrgdina av Føroyum. Allir flokkar eru samdir um ein sjálvberandi búskap, og tað er bara ein onnur orðing fyri at ráða sær sjálvum"*

Gunnar seg duga at síggja t.d. í sjónvarpssendingini, sum herfyri varð send um Sunleif Rasmussen, har bygdarfólkið kom yvir og heilsaði honum, men legði samstundis afturat, at tey ikki skiltu nógv av tí, hann gjørdi. Tað sama var við Ingálvi av Reyni í sínari tíð. Felags fyri hesar báðar listamenninar er kortini, at báðir ganga nýggjar leiðir og geva okkum nýggjar mátar at síggja okkum sjálvi uppá.

### Mentunarpolitikkur, rammuskaparar og Ginusøgur

- Uppgávan hjá mentunarpolitikkinum her á landi er sostatt sambært Gunnari at varðveita mentanina og stimbra listina, sum eigur at geva okkum tað óroynda og óvæntaða, tí kemur ikki nýtt blóð og nýggjur vøkstur, doyr alt.

Spurdur, um hann í sambandi við mentunarpolitikkin, kundi hugsað sær eitt hægri støði í orðaskiftinum, sigur Gunnar, at tað kann altíð blíva betri. Men her heldur hann, at skúlin er ein møguleiki, sum vit ikki mugu gloyma, og tí er týdningarmikið, at vit ikki bert fáa skúlaskipanir, sum bara eru avskriftir eftir øðrum. Vit eiga at gera næmingarnar forvitnar, og og vekja eyguni hjá teimum fyri tí, sum hendir her og úti í heimi, sigur Gunnar.

Men hvat heldur Gunnar Hoydal, sum sambært grundgevingini hjá Mentamálaráðnum m.a. hevur fingið mentanarvirðislønina fyri at "flyta mørk", um gongdina í mentunarkjakinum hesa seinastu tíðina, har fýra løgtingsmenn, blanda seg upp í konkret viðurskifti og ynskja at skerja stuðulin til Leikpall Føroya, av tí at Ginusøgur standa í leiksránni?

Í flestu londum gera politikararnir rammurnar, men blanda seg ikki upp í hvat slag av tilfari síðani kemur burturúr. Hesum er man farin frá allastaðni rundan um okkum. T.d. vita bæði Ísland og enntá Grønland, at mentan og skapandi virksemi eru vorðin ein tann størsta vinnan í heiminum, og tá er tað nokkso "stuttligt", at tað almenna ger slíkt, sum vit sóu herfyri. Men tað endaði kortini væl, og tað var ein veldigur sigur, at heili 28 tingmenn atkvøddu fyri ginunum, og tað vísir eisini, at vit hóast alt eru komin nokkso langt, sigur Gunnar.

- Breyðið og búskapurin eru nevniliga bert skónin, meðan mentanin og listin skapa rúmið. Mentan og list gera okkum opin, órædd, kenslurík, og tey gera, at vit kunnu líta øðrum til, eisini teimum, vit eru ósamd við, hugleiðir skaldið.

### Almennu loftmiðlarnir

Men hóast Gunnar Hoydal heldur, at vit á summum økjum eru komin langt, so er hann ikki nøgdur við avrikið hjá teimum almennu loftmiðlunum, tá talan er um mentunarpolitikk.

Útvarpið og sjónvarpið gera alt ov lítið burturúr. Tað er heilt bedrøviligt, tá tað kemur til útvarpið, sum er ein orðmiðil, og eigur at vekja áhugan fyri orðinum, men kortini hoyra vit einki nýtt og óroynt sum t.d. nýggjar yrkingar í útvarpinum, sum Gunnar heldur vera alt ov marknaðarorienterað.

– Vit gjalda lurtara- og hyggjaragjald, og tað átti at givið loftmiðlunum eina skyldu, men tað vísir seg, at teir hava brúk fyri einum skumpi. Eitt dømi um eitt sovorðið skump er Listastevnan, sum fyrst fekk eina stuttsøgukapping og síðani eina leikritakapping í lag saman við ÚF. Men skumpið átti at komið innanífrá, heldur Gunnar Hoydal.

- Ein partur av mentunarpolitikkinum er kortini, at tey sum arbeiða við mentan og list vinna sær rættindi t.d. við LISA og Fjølrit. Men okkurt hendir í løtuni á økinum, eitt nú í Mentamálaráðnum, har arbeitt verður við at ganga nýggjar leiðir, metir Gunnar.

### Politikkur og tað hugsjónarliga umrenslið

Hann heldur fram við at siga, at tað hevði verið ynskiligt, um miðlarnir høvdu reglulig ummæli av tí, sum kemur út og verður sýnt fram, men hann sigur seg eisini skilja, at tíðindi verða prioriterað, sum tey verða, tí tað sum vekir áhugan einum, nýtist ikki at vekja áhugan hjá einum øðrum. - Men ofta kunnu bókainnsløg fanga fólk, tí ofta eru tíðindi í teimum, tí tey vísa okkum, hvørji vit eru, og hvagar vit fara. Tað er yvirdrivið at halda, at tað eru politikararnir, sum gera av, hvat hendir. Tí tað, sum hendir, hendir har fólk tosa og hittast á arbeiðsplássum, á gøtuni ella á veitslum. Har fer líka sum eitt annað stoffskifti fram, og tað hugsjónarliga umrenslið gerst eitt annað, sigur Gunnar, meðan blaðmaðurin biður hann útgreina hetta nærri.

– Jú, hvørja ferð okkurt politiskt klandur er í einum skoti tyrpast miðlarnir saman. Men tann fjórða statsmaktin, sum miðlarnir ofta verða róptir, er sambært Gunnari ein fiktión ella í øllum førum er hon yvirdrivin. Miðlarnir eru sum nevnt marknaðarorienteraðir, og tann opni journalistikkurin hugsar meira og meira um at selja søgur, og tá er ikki altíð, at samfelagið verður lýst, so sum ynskiligt hevði verið. Gunnar heldur nevniliga, at mentanin er fortreytin fyri politikki. Ikki partapolitikki, men hvussu samfelagið skilir seg sjálvt. Politikkur er í hesum sambandi bert eitt amboð.

- Hugsjónarpolitikkur var leingi eitt ljótt orð í Føroyum, og ikki fyrr enn vit fóru á húsagang, sóu vit, at hugsjónir høvdu nakað at siga, sigur Gunnar. Tað er eisini tí at hann hevur kallað nýggjastu bókina hjá sær við greinum og tíðartekstum, "Land í sjónum". Dupulttýdningurin í heitinum er ikki at fara skeivur av. Føroyar liggja mitt í havinum, men liggja eisini mitt í nógvum sjónum og hugsjónum.

Gunnar metir tó ikki, at føroyingar eru so sundur- ell tvíbýttir, sum ofta verður ført fram. – Næstan øll eru samd um, at føroyingar skulu taka ábyrgdina av Føroyum. Allir flokkar eru samdir um ein sjálvberandi búskap, og tað er bara ein onnur orðing fyri at ráða sær sjálvum. Hetta sást eisini aftur, tá samgonguskjalið varð undirskrivað, og andstøðan segði, at hatta kundu tey eisini skrivað undir, sigur Gunnar, sum sjálvur sigur seg halda, at tað var eitt afturstig, tá hendan samgongan bara fór at tosa um sjálvberandi búskap, ið bara er ein partur av politikkinum.

### At seta alt í eina heild

Spurdur um, hví Gunnar yvirhøvur leggur í at taka lut í samfelagskjakinum og m.a. geva bøkur út við greinum og meiningum, svarar hann: - Eg veit ikki, um tað er ein skylda, jú kanska, men áhugin hevur drivið verkið. Hann kemur tó ikki úr ongum, tí har eg vaks upp var tað náttúrligt at fylgja við í samfelagsligum viðurskiftum her og úti í heimi. Tað er eisini spennandi at fylgja við og seta í eina heild og eisini ávirka gongdina.

Í hesum sambandi kemur Gunnar inn á brævaskiftið millum William Heinesen og Jørgen-Frantz Jacobsen, sum ikki bert umfatar tey brøvini, sum eru prentað í bókini "Dýrmæta lív", men sum telur nógv fleiri brøv. – Teir vóru hugbornir, kenslubornir og kritiskir ímóti sær sjálvum, men teir dugdu tað at seta alt í eina heild, sigur Gunnar, og kallar teir nakrar av teimum fínastu eygleiðarunum, norðurlond hava átt. Beint nú verður skrivað um eitt óprentað handrit hjá Williami, men Gunnar gleðir seg nógv meira til, at hetta brævaskiftið kemur á prent.

Heildin hevur sum nevnt altíð verið eitt av eyðkennunum í skaldskapinum hjá Gunnari, og í øllum, hann skrivar, viðger hann Føroyar og Verðina. Hetta er eisini galdandi, tá Gunnar tosar um myndlist. Eyðkent fyri føroyska landslagsmyndina hevur verið tann ekspressionistiska landslagsmyndin, men nú tykist, sum okkurt er við at henda, og tí er eisini neyðugt at fáa útlendskar framsýningar hendanvegin, heldur Gunnar. Men nógv føroysk listafólk eru úti í heimi, so spurningurin er bara, um tey venda heim aftur, tí tað er ikki lætt at arbeiða fulla tíð við list her í Føroyum. Hetta kundi verið bøtt um við at útvegað teimum atelier, og eisini kundu tey fingið uppgávur frá fyritøkum og tí almenna. Somuleiðis kann tað blíva innantrongt hjá yrkjarum, og her tekur núverandi formaðurin í egnan barm og sigur, at her kundu yrkjararnir sjálvir gjørt meira við at t.d. gjørt nýggjar formar við yrkingalist við upplestri o.ø.

### Verðin og oyggjalandið

Ofta siga ungir yrkjarar seg hava eldri føroyskar yrkjarar sum fyrimynd, men so var ikki við Gunnari, sum longu sum ungur leitaði í verðini eftir heimsbókmentum og las eitt nú enskan og franskan skaldskap. - Tað fyrsta ein yrkjari skal gera, er at lesa so breitt sum gjørligt av dygdarverkum, sigur skaldið, sum í næstu viku fær handaða Mentunarvirðisløn Landsins. Og júst heitið á virðislønini fær prátið millum listamann og blaðmann at peika ta listaligu sjóneykuna hjá skaldinum, sum so ofta hevur flættað Føroyar og Verðina saman, niður á Føroyar sjálvar. Føroyar sum oyggjaland. Eisini her sær Gunnar ein mun í dag, tá talan er áhugan fyri listini, sum ofta verður útint í høvuðsstaðnum. Enn er tað tó dagsverk at fara úr Suðuroynni til Havnar, har tey flestu listaligu tiltøkini fara fram, men við Vágatunlinum heldur Gunnar, at vit sóu, at fólk eitt nú bóru fram, at nú høvdu tey bara eina lítla løtu at ferðast til tiltøkini í høvuðsstaðnum. Eisini heldur hann Mentunarhúsið í Fuglafirði, har ein bygd hevur staðið saman um eitt tílíkt hús, vera áhugavert. Men tað er eisini heilt nýtt, at landið letur virðisløn, og tað er tekin um at tað listaliga arbeiðið verður virðismett. Tí tað er meira avgerandi, enn hvør fær hana, sigur Gunnar at enda í húsum sínum við ljóði og flagtekju, haðani útsýnið oman yvir Havnina og Verðina er sera gott.

> *"Tað at liva í einum so lítlum landi sum Føroyar, kann tó eisini hava sínar avmarkingar, og hetta sæst eitt nú aftur, tá talan er um ummæli. Her kanst tú nevniliga møta tí persóninum í morgin, sum tú kritiseraði í gjár, og tí kann tað kanska gerast eitt sindur tilvildarligt, hvat fólk orkar at ummæla, tí ofta er hetta eitt ótakksamt arbeiði, og kritikkurin kundi verið meira skipaður"*

> *"Byggilistin er ein konkret list, tí hon hevur beinleiðis ávirkan á fólk, ávirkan á býin. At skipa ein bý er at arbeiða við mentan, hvussu fólk liva saman í sínum umhvørvi, og tað er nógv týdningarmiklari enn at finna tekniskar loysnir"*



# Gamla skaldið og gloymda søgan

William Heinesen hevði fylt 103 ár mikudagin 15. januar 2003. Hann er kortini háaktuellur í løtuni. Jess Jessen, stjóri í Frederiksberg Antikvariat, hevur ætlanir um at geva út eina skaldsøgu, sum hevur ligið og savnað dust í goymslunum hjá Munksgaard

HANDRIT

*Ingi Rasmussen*



»Tað næsta verður, at fólk í Føroyum nú fara at lesa William.«

Soleiðis helt ein av mongum Heinesen-serfrøðingum skemtiliga fyri í einum púrasta óformligum práti nú ein dagin. Kanska er nakað um tað kortini.

Í sínari samtíð tóku føroyingar ongantíð rættiliga William Heinesen til sín. Gamaní vóru teir ernir, tá hann fekk Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins fyri skaldsøguna »Det Gode Håb«, men kanska var tað ein forðing fyri føroyingar, at hann skrivaði á donskum. Helst hóvaði tað eisini pørtum av føroyingum illa, at hann gjørdi gjøldur burturúr fordømandi prædikantum og heldur stillaði seg hjá teimum glataðu.

Nú er William Heinesen av álvara í brennideplinum aftur, tí eitt ókent skaldsøguhandrit frá 1920-unum er komið fram. Skaldsøgan, sum kanska verður útgivin seinni, kallast »Den yderste tid«. Helst er tað fyrsta skaldsøgan, sum William Heinesen yvirhøvur hevur skrivað. Hon er ongantíð komin út, og fólk, ið eru væl inni í skaldskapinum hjá Williami, hava heldur ikki hoyrt tittulin nevndan áður í øðrum samanhangi.

Jess Jessen, stjóri á Frederiksberg Antikvariat, sum hevur handritið í varðveitslu, sigur talan vera um eitt vælskrivað og gjøgnumrættað handrit, ið hevur verið nærum klárt til prentingar. Hann kundi hugsað sær at givið tað út sum endurprentað handrit, men tað eru arvingarnir, sum eiga rættindini, og tí skulu teir spyrjast eftir fyrst.

Jógvan Isaksen, bókmentafrøðingur, heldur handritið verða áhugavert, men hann ivast í, um tað er rætt at geva tað út. Hann grundgevur tað við, at William sjálvur hevur latið tað verið í gloymibókini.

– Støðið hjá Williami var óvanliga høgt frá fyrstu til síðstu bók, og eg kenni ongan annan høvund, sum hevur havt so høgt støði allan vegin ígjøgnum. William Heinesen sjálvur hevur ikki viljað givið tað út, so tað er spurningurin, um ættarlið, sum koma eftir hann, eiga at gera tað. Tað leggur so onki afturat hansara skaldskapi, sigur Jógvan Isaksen.

Tað var annars vinurin hjá Williami, Otto Gelsted, ið var redaktør hjá Munksgaard, sum vrakaði skaldsøguhandritið hjá Williami. Hann helt, at William Heinesen skuldi skriva lýrikk og essay.

William Heinesen sjálvur skrivaði altíð á skrivimaskinu við gjøgnumslagi, og tí er rættiliga vist, at hann sjálvur hevur havt eitt eintak av handritinum liggjandi. Í einari samrøðu við Bjarne Nielsen Brovst avdúkaði William Heinesen, at hann hevði nógv liggjandi, sum ongantíð varð givið út. Kanska skuldi eg brent tað, legði hann afturat, og tað sigst eisini, at hann brendi nógv persónlig pappír í 1980-unum.

Nú er so eitt ókent handrit knappliga komið undan kavi, og hóast William hevði verið yvir 103 fyrsta dagin, er altso ikki óhugsandi, at ein nýútgáva kemur út í hansara navni.

## Málteigurin

**»Í tráð við«**
Hvussu ofta ið sagt verður og skrivað "í tráð við", er og verður tað óføroyskt. Hetta eigur at verða lagt av sum skjótast! Hetta er rættiliga nýkomið úr donskum, har tað eitur "i tråd med" og helst einki samband hevur við "tráð", men heldur orð, ið merkir 'gongulag' el.tíl. (smb. at troða). Á føroyskum kundi hetta eitt nú verið orðað í samsvari við el. samsvarandi.

**Bygdanøvn**
Sýnið fólki tann sóma at fara rætt við nøvnunum á bygdum og býum teirra og annars øllum staðanøvnum. Eitt bygdarnavn, ið varð illa viðfarið herfyri, var Ljósá. Navnaformar, ið hoyrdust, vóru m.a. "av Ljósáum", "á Ljósáum", "í Ljósáum", "úr Ljósáum". Einki av hesum sniðum og fyrisetingum er í nánd við at vera á rættari leið. Bygdin eitur við Ljósá, og ein sum er úr teirri bygdini, er tí frá Ljósá . Áin er bert ein! Man tað ikki vera navnið á grannabygdini sunnanfyri, sum verður vavt uppí. Hon eitur í Svínáum.

**Dalenni**
er hvørkikynsorð og er tí óbroytt í bending uttan í hvørsfalli, har sum tað eitur Dalennis. Tí var tað heldur enn ikki ótýdligt at síggja hetta í einum blað: "Smærri nøgdir av trolfiski frá Dalenna (!)".

**Hvussu eitur pávin?**
Rætt ger sjónvarpið at kalla pávan Jóannes Páll. Jóannes Pauli er óhóskandi. Pauli er komið av latínskum hvørsfalli av Paulus. Í donskum álmanøkkum stóð við pálsmessudag 25. jan. "Pauli omvendelse". Hetta navn hóskaði væl í føroyskari bending og er nú vanligt navn, ið má sigast at hava vunnið hevd. Men sum seinna navn pávans hevur tað ikki sørt løgnan dám.

*Úr Orðafari nr. 3 1987*

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Rúnar Reistrup, Siena — runar@reistrup.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

# Kennir tú land mítt?

Sum føroyingur uttanlands sleppur tú ofta at forklára nærri hvaðani tú kemur. Tí tá tú sigur Faroe Islands, isole di Faroe, Färöer Inseln ella okkurt annað av teimum nøvnunum, sum útlendingar hava givið okkara landi, er svarið sum oftast "Hvat er tað?"

Tí er tað ofta freistandi at siga, at man kemur úr Danmark. Tað vita tey um ikki annað hvat er. Og havi eg skund ella bara ikki hug til at forklára nakað nærri, so velji eg eisini ta loysnina. Men sum oftast royni eg tó at siga fólki sannleikan um mín uppruna.

Tey hundraðtals fólkini, sum eg havi møtt hesar farnu fýra mánaðirnar í Italia hava ikki øll verið italienarar. Her ýður í fólki úr øllum heiminum, eftir at hava tosað við ein part av teimum, er tað eyðsýnt, at har er ein greiður samanhangur millum hvar fólk koma frá, og um tey kenna til eksistensin av landinum Føroyar.

Lat okkum taka amerikanararnar fyrst. Millum europearar bera teir vanliga orð fyri ikki at vera áhugaðir í øðrum enn teirra egna bakgarði, og eftir at hava tosað við hópin av amerikanarum kann eg staðfesta, at bara ein teirra visti um Føroyar. Hann var flogskipari í amerikanska herinum og hevði flogið yvir Føroyum talríkar ferðir. Men eg kenni heldur ikki meira enn nakrar fáar statir í USA, og veit illa hvar í landinum teir liggja, so eg kann illa krevja annað av amerikanarunum.

Støðan millum onglendingar, fraklendingar og hollendarar er ikki nógv frægari, hóast hetta eru nærum grannalond okkara. Onkur hendinga fraklendingur heldur seg hava hoyrt navnið á landinum fyrr, men veit ikki hvar tað liggur, meðan onglendingar tykjast at hava lært um oyggjabólkarnar í norðuratlantshavinum í skúlanum — og gloymt tað aftur.

Spaniólar vita hinvegin næstan allir sum ein um Føroyar, og ofta strekkir vitanin seg ovfarandi langt. Nógvir týskarar hava landið feskt í minninum, og allir eysturríkar, sum eg havi møtt, vita alt ov væl hvat Føroyar eru.

Tað er hvørki fisk ella grindadráp hesi fólkini kenna oyggjalandið fyri, men fótbólt!

Spaniólar hava spælt fýra altjóða kvalifikationsdystir ímóti Føroyum, Týskland hevur bara spælt ein, men hann var minningarríkur, og eysturríkar hava spælt fýra, harav teir bert minnast tann eina. Italienar kenna eisini rættiliga væl Føroyar, men bert menninir, hvørs heimur í stóran mun er uppetin av fótbólti.

Føroyska fótbóltslandsliðið hevur gjørt Føroyar kendar, har tað er komið, og har tað enn ikki er komið, vita fá at landið finst. Men tað er væl bara ein spurningur um tíð, áðrenn landsliðið hevur verið runt alt Europa.

Sjálvandi er tað munur á londum og hvussu stór bagatell ein fótbóltsdystur er frá landi til lands. Tað bítur ikki rættiliga á, tá man spælir ímóti einum landi sum Sveits, men kemur Føroyar í kvalifikatiónsbólk saman við Italia ella Portugal, verður landið við eitt kent og, um liðið spælir væl, eisini seint gloymt.

Tí tað er ikki av at tapa 8-0, at føroyska landsliðið og harvið Føroyar eru vorðnar kendar, men av góðum — og lat okkum bara brúka orðið "heiðurligum" - úrslitum. Ryktið úti í verðini sigur, at Føroyar hava eitt rættiliga gott fótbóltslandslið. Eingin kennir Føroyar sum hitt landið, sum altíð tapir, hóast hetta - og latið okkum nú vera erlig - er tann beiski veruleikin.